# Ortega tapti



Reuter

Tað eydnaðist ikki fyrrverandi forsetanum í Nicaragua, Daniel Ortega, at koma aftur til valdið.

Hóast minni enn so allar atkvøðurnar frá forsetavalinum sunnudagin vóru upptaldar í gjár, bendi alt á, at sitandi forsetin, tann konservativi Enrique Bolanos, hevði vunnið á gamla sandinistaleiðaranum Daniel Ortega.

Valluttøkan var so stór, at valhølini noyddust at hava opið longur enn ætlað, so allir veljararnir kundu sleppa at seta krossin. Roknað varð við einum sera jøvnum úrsliti, men uppteljingin í gjár vísti, at Bolanos fór at vinna.

Enrique Bolanos er handilsmaður, sum er fyri marknaðarbúskapi, og hann hevur fingið hollan stuðul úr USA. Hinvegin hava amerikansku myndugleikarnir ikki dult fyri, at teir halda lítið um Daniel Ortega, sum var ein av oddamonnunum fyri sandinistisku kollveltingini í Nicaragua í 1979.

Táverandi amerikanski forsetin, Ronald Reagan, setti strong handilstiltøk í verk ímóti Nicaragua, eftir at Ortega var komin til valdið. Úrslitið varð, at Nicaragua leitaði sær stuðul frá Kuba og Sovjetsamveldinum. Reaganstjórnin fíggjaði og vandi teir sonevndu contrasuppreistrarmenninar, sum í áravís bardust ímóti sandinistastjórnini. Hildið verður, at borgarakríggið kostaði umleið 30.000 mannalív.

### USA stóran týdning

Undir valstríðnum hava vinnulívsfólk ávarað fólk ímóti at stuðla Daniel Ortega, tí eftir teirra tykki hevði tað komið landinum í búskaparligt óføri, hevði Ortega vunnið. Tað hevði eisini havt við sær, at USA hevði avmarkað sítt samband við Nicaragua nógv, og at útlendskir íleggjarar høvdu vent landinum bakið.

Ortega hevur hinvegin fingið dyggan stuðul frá fátækrafólkinum á bygd, tí hann hevur lovað teimum betri livikor og arbeiðspláss.

Eygleiðarar siga, at komandi forsetin fær eina trupla uppgávu at loysa. 70 prosent av teimum 4,8 milliónunum, sum búgva í Nicaragua, liva í fátækradømi, og arbeiðsloysið er heili 53 prosent.

Umleið 10.000 eygleiðarar fylgdu við, at valreglurnar vórðu hildnar, og einki er frætt um valsvik.

## Amnesty ávarar ímóti Norðursamgonguni

Amnesty International ávarar amerikansku stjórnina ímóti at rudda slóð fyri Norðursamgonguni í Afghanistan. Amnesty væntar, at fær samgongan valdið, kann tað enda við ræðuligum ágangi ímóti afghanska sivilfólkinum.

– Koma brotsmenninir í Norðursamgonguni til valdið, verður tað heilt greitt byrjanin til ógvusligan og ræðuligan ágang ímóti sivilfólkinum í Afghanistan, sigur norðmaðurin Jon Peder Egenæs, sum arbeiðir hjá Amnesty International, og sum í løtuni er í Pakistan, har hann hevur tosað við flóttafólk, sum eru komin úr Afghanistan.

– Tey, sum vit hava tosað við, hava øll greitt frá, at tey eru flýdd undan teimum amerikansku bumbunum. Mong hava greitt frá, at tey hava mist skyldfólk í bumbuálopunum. Ein maður greiddi okkum frá, at hann hevði mist átta skyldfólk í einum álopi, men vit kunnu sjálvandi ikki vita, um hann sigur satt, sigur Jon Peder Egenæs.

Hóast Amnesty International seinastu árini hevur funnist hvassliga at framferðini hjá Talibanstýrinum, tí tað ferð eftir ferð hevur brotið mannarættindini, er felagsskapurin alt annað enn fegin um amerikanska stuðulin til Norðursamgonguna.

-Sleppur Norðursamgongan til valdið í Kabul, kann tað enda í ræðuleika. Vit hava skilt, at afghanska sivilfólkið ræðist Norðursamgonguna og tað av góðum grundum, sigur Jon Peder Egenæs.

Ein av leiðarunum í Norðursamgonguni er Rashid Dostum. Undir sovjetsku hersetingini í 1980-árunum var hann ovasti fyri teirri loyniligu afghansku løgregluni, og tað er ikki fyri tað góða, at flestu afghanar framvegis minnast navn hansara.



# Ljómandi songur og hvítnandi tindar

**Við allahalganna konsertina hjá Ljómi sunnudagin í Vágs kirkju, varð eisini gamla urgan frá 1872 aftur tikin í nýtslu**

KIRKJUTÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Kirkjukórið Ljómur hevði sunnudagin allahalganna konsert í Vágs kirkju. Hetta er tiltak, ið kórið hevur havt í mong ár. Ein afturvendandi løta við hesar konsertir er, tá sálmurin Nú Hvítna Tindar verður sungin. Og júst henda dag hendi tað. Tindarnir kring Vágsfjørð hvítnaðu og undirstrikaðu hugnaligu løtuna í Vágs kirkju, har kór og tónleikarar framførdu fyri nærum fullsettari kirkju.

Fjølbroytt skrá setti dám á. Kór og leiðarar stóðu fyri eini flottari konsert við sangi og tónleiki. Dorte Tilma og Hans Pauli Tórgarð stjórnaðu Ljómi og hornblástri tóku Steve Foggin, Johan Hentze, Ásla Magnussen og Brandur Enni sær av. Niels og Jóannes Nolsøe leiktu urgu. Jónsvein Bech, prestur, takkaði fyri sangin og tónleikin og sigast má, at tøkkin var uppiborin.

### Gamla urgan

Gamla urgan í kirkjuni í Vági er sett aftur í stand og varð við konsertina tikin aftur í nýtslu. Og tveir urguleikarar, ið óivað hava byrjað urguleiðina við hesa urgu, eru júst brøðurnir Jóannes og Niels Nolsøe. Teir hava eisini báðir tænt bæði Ljómi og kirkjuni væl og fingu teir gávu, eins og tónleikarar og kórleiðarar.

Eftir sálmin Eitt Snjóhvítt Herlið, leitaði fjøldin út í kavan, eftir eina løtu, ið fløvar, tí prógvað er, at dugur er í, hóast bæði urga og kór teljast millum elstu í landinum hvør á sínum øki. Árini geva royndir og vitan, geva dygd, ið er við til fáa áhoyraran at gloyma, hvussu nógvir venjingartímar liggja aftanfyri – og soleiðis skal tað vera.





# Snotilig føroysk barnaklæðir á Torginum

Í døgunum, 6. til 10. novembur verður forvitnislig sølframsýning við barnaklæðum, ið eru framleidd í Føroyum. Tað eru tær báðar, Beinta Mouritsen og Elisabeth Christiansen, sum eru kvinnurnar aftan fyri føroyskt framleiddu klæðini, sum vitjandi kunnu síggja í hesum døgum.

Tær báðar hava fingist við seyming av ymsum slagi síðani tær vóru smágentur.

Í marts mánaða gjørdist virksemi teirra til meira enn ítriv og framleiðsla til egna nýtslu. Tá innrættaðu tær nevnliga eitt fjós til seymistovu, har tær í dag binda og seyma barnaklæðir. Higartil hevur tað bert verið eftir bílegging.

Fjósið ímyndar rættiliga væl ein stóran part av framleiðslu teirra. Tí nógv av teimum klæðnapløggum, tær evna til, eru gjørd úr tøvdari føroyskari ull.

Tó nýta tær báðar annað enn føroyska ull í síni framleiðslu. Nevnast kann eitt nú fleece.

Tær báðar hava eisini gjørt føroysk klæðir til børn, og hesi fara tær somuleiðis at hava í sølubásinum á Torginum.

Hósdagin 8. novembur letur eisini stóra PILA-tiltakið upp á Torginum í SMS.

# Føroyingur í fongsul fyri grovar hóttanir í Danmark

RÆTTURIN
*Bent Bernardi Sørensen*

Ein handil hjá Tele Danmark skuldi spreingjast í luftina, eldur skuldi setast á eina politistøð og ein løgreglumaður skuldi kvælast

Ein 42 ára gamal føroyingur hevur í rættinum í Herning fingið eitt hálvt ára treytaleysa fongsulsrevsing, tí hann millum annað hevur hótt við at drepa ein løgreglumann, seta eld á politistøðina í Herning og at spreingja ein handil hjá Tele Danmark í luftina.

Í rættinum sýndi føroyingurin, at hann var rættuliga beiskur inn á samfelagið í almindiligheit og inn á løgregluna í serdeilisheit. Orsøkin til hetta kann finnast í, at hann í fjør varð handtikin aftan á ein bardaga í Varmestuen hjá Blå Kors í Herning. Maðurin heldur, at hann varð handtikin av órøttum. Síðan tá hevur hatrið til myndugleikarnar rættuliga tikið yvirhond.

### Vánaligur tónleikur

Eitt tilvildarligt starvsfólk hjá Tele Danmark, sum ikki hevði møguleika til at stilla føroyingin beinleiðis um til Ringkøbind Statsamt, varð beinanvegin hótt. Starvsfólkið fekk at vita, at telehandilin fór at verða sprongdur í luftina innan ein hálvan tíma. Í rættinum greiddi føroyingurin frá, at orsøkin til at hann var komin við hesi hóttanini var, at tónleikurin, sum var at hoyra í telefonini, meðan hann bíðaði, var út av lagi vánaligur.

Seinni ringdi føroyingurin til politistøðina og greiddi frá, at hann vildi koma við eini spann av bensini og seta eld á støðina. Hann greiddi eisini frá, at ein ávísur løgreglumaður skuldi kvælast við berum nevum.

### Skít í buks

Rættarfundurin varð upprunaliga settur fyri nøkrum vikum síðan, men hetta helt ikki føroyingin frá at koma við fleiri hóttanum. Hann ringdi til dómarakontórið í Herning og segði millum annað: »Eg skal fáa dómaran at skíta í buksirnar av ræðslu.« Málið varð útsett, tí at dómarin er ógegnigur, tá hann verður hóttur.

Tí kom ein dómari úr Aalborg, Carsten Michelsen til Herning at døma saman við tveimum dómsmonnum.

Verjin hjá føroyinginum, Jørgen Quade Andersen royndi hvat hann kundi at fáa revsingina linari og at geva klientinum treytaðan dóm.

– Fongsul vil gera støðuna enn verri hjá mínum klienti. Hann gerst enn verri fyri. Tað vil vera fyribyrgjandi at geva honum treytaðan dóm og lata hann flyta aftur til Føroyar, segði verjin.

Føryingurin er longu komin heim aftur til Føroyar. Rætturin fylgdi ákærumyndugleikanum og gav manninum seks mánaða treytaleysa fongsulsrevsing.


Føroya Tele søkir eftir fólki til Fíggjardeildina

"Annað er til í verðini enn pengar, t.d. kekkar og gjaldskort!"
Ókendur



Til okkara Fíggjardeild verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. januar ella skjótast gjørligt. Nýggja fólki skal luttaka í menningini av fíggjarfyrisitingini og -stýringini av fyritøkuni.

Á Fíggjardeildini starvast 4 fólk. Uppgávurnar vera, saman við hinum starvsfólkunum á Fíggjardeildini, at vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum:

· ársroknskapur og aðrir tíðarroknskapir
· fíggjarætlan, uppfylging av fíggjarætlanum v.m.
· virkisøkisroknskapir
· gjaldførisuppgerðir
· viðlíkahald av anleggskartoteki, herundir uppfylging av íløgum
· skrivligar mannagongdir v.m.
· ymsar ad hoc uppgávur

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður, skal hava hægri útbúgving innan búskap ella roknskap (cand. merc. aud., cand. merc. økonomistýring, HD (R) e.l.) ella hava hollar royndir og førleika innan roknskapararbeiði frá líknandi størvum ella frá grannskoðara. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur

· hollan EDV-kunnleika
· góð samstarvsevni
· evni at arbeiða sjálvstøðugt

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarvi við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingarpláss.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi førleikum

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, tlf 303030, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. november 2001.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av megninpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt. Hetta setur stór krøv til fyritøkuna og starvsfólkið, herundir eisini til starvsfólkið í fíggjarøkinum.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!